**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Toftir 14. mai 2016

Góðu tit í starvsnevnd ÍSF,

Tað harmar okkum almikið at støðan í Ítróttasambandi Føroya er vorðin sum hon nú einaferð er. Og tað enn meira, nú tað sæst at trettan av sersambondunum hava valt eina nýggja starvsnevnd, uttan at vilja bjóða okkum seinastu trý upp í hesa tilgongd.

Vit mugu tíverri staðfesta, at tað tykiskt sum um at Ítróttasambandið er um at klovna. Og at endin væl kann verða, at tað støkkur sundur, um vit nú aftaná komandi aðalfund hava eitt ÍSF, har ið nøkur sersambond eru bevíst útihýst frá ávirkan og vitan um tað sum felagsskapurin ger og avger.

Í Svimjisambandinum eru vit ikki í iva um, at býtið av peninginum hjá ÍSF skal fara fram á ein rættvísan og gjøgnumskygdan hátt, soleiðis at eingin er í iva um á hvørjum grundarlagi tað byggir. Eins og tað er sjálvsagt, at allar avgerðir undir ÍSF eiga at fara fram sambært evstulóg ÍSF.

Tá ið ein nýggjur forseti og ein nýggj starvsnevnd nú skulu veljast, so halda vit tað vera av alstórum týdningini, at vald verða fólk, sum hava sum fremsta endamál at savna heldur enn at spjaða føroyskan ítrótt. Tí meta vit, at tað er alneyðugt, at tey umboð sum nú verða vald í starvsnevndina, ikki eru beinleiðis partur av teirri tvístøðu, ið hevur verið seinastu tíðina.

Hóast tað mangan hevur leikað hart á í starvsnevnd og stjórn hjá Ítróttasambandi Føroya, so hevur tað altíð virkað á tí grundarlagi, at semjur skulu finnast við konsensus, reglusemi og virðing fyri øllum pørtum. Umframt at vit, sum standa á odda fyri ymisku felagsskapunum undir ÍSF, eisini virða okkara egnu leiðreglur til góðan atburð hjá leiðarum, har tað sum kardinalpunkt eru millum annað gjøgnumskygni og reglusemi, og at allir limir skulu kunna vera við til at taka avgerðir.

Starvsnevndin í SSF hevur á fundi við formenn og -kvinnur í føroysku svimjifeløgunum viðgjørt støðuna, og harmast vit øll um, at tað nú er komið hertil, at Svimjisambandið og onnur sersambond kenna seg útifryst úr tí samlaða ÍSF. Starvsnevnd SSF og feløgini eru samd um, at vilja stríðast til tað síðsta fyri eitt sterkt og sameint ÍSF. Men líka samd eru vit um, at um støðan enn aftaná aðalfundin er líka fastløst sum nú, so eru vit til reiðar at taka neyðug stig til at tryggja okkara felagsskap.

Vit ynskja at nýggi forsetin ikki verður valdur millum stríðandi partarnar,  og at teir upplýsingar, sum liggja til grund fyri býtislyklinum, eru eins fyri øll. Vit ynskja at tað verða gjørdar greiðar reglur fyri, hvat útbýtti stuðulin kann/skal brúkast til, og at grundarlagið fyri býtislykilin er gjøgnumskygt. Men okkara krav er sjálvsagt, at vit kunna taka lut í tilgongdini at byggja upp aftur Ítróttasamband Føroya, á jøvnum føti við onnur.

Vegna starvsnevnd SSF

Rókur í Jákupsstovu